## Chelsea snávaði

Í gjárkvøldið skuldi Chelsea spæla hálvfinalu í lítlu ensku steypakappingini, Liga Cup. Her møttu teir Wycombe Wanderers frá fjórðubestu ensku deildini, og undan dystinum var ikki væntað, at Chelsea fór at fáa stórvegis trupulleikar við mótstøðuliðnum. Chelsea megnaði tó ikki at vinna dystin. Teir løgdu seg annars eftir ætlan á odda við fyrsta málinum hjá Wayne Bridge hetta kappingarárið, men enska meistaraliðið kláraði ikki at varðveita leiðsluna. Eitt korter fri tíð javnaði Jermaine Easter, og 1-1 gjørdist eisini endaliga úrslitið.



## HIK vil hava Toda

Bold.dk skrivar, at HIK er eitt av feløgunum, sum er áhugað í at fáa Toda at spæla fyri seg. Danska 1. deildarfelagið váttar, at tað hevur verið í sambandi við Toda, men at onnur feløg eisini eru áhugað í honum. - Tað passar, at eg havi tosað eitt sindur við Toda, men eg haldi, at hann hevur brúk fyri eitt sindur av tíð til at finna út av, hvat hann ætlar. Vit eru tó avgjørt áhugaðir í honum, og tað eru onnur feløg eisini, sigur Nicolai Kaas-Heilmann, stjóri í HIK, við bold.dk.HIK hoyrir heima í Hellerup og liggur niðarliga í donsku 1. deild. (mynd av Toda)

Kyndil-VB 19-25 (10-12)

# VB annað beinið í finaluni

**Við tryggum sigri á útivølli ímóti Kyndli í fyrru hálvfinaluni í Coca Cola-kappingini hjá kvinnum lat VB ongan iva vera um, at tær ætla sær í finaluna**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Gongdin hjá Kyndli hevur ikki verið tann allarbesta í ár. Tær liggja á fjórða plássi, men munurin upp til nr. 3 er somikið stórur, at tað skal gangast teimum avbera væl, um tær skulu røkka bronsuheiðursmerkjunum.

Hjá VB hevur hinvegin ikki gingið so gali. Tær liggja nr. 3 í bestu kvinnudeildini, men munurin upp til oddaliðið, Stjørnuna, er bert tvey stig, so undan fyrru hálvfinaluni mátti VB metast at vera favorittur.

### Grundin bleiv løgd

Mest sum frá fyrsta bríksli gjørdist greitt, at henda dystin ætlaði VB at vinna. Fyrstu løtuna var Kyndil annars frammanfyri, men tá VB fekk gongd á, so gjørdist tað trupult hjá Kyndli. Longu eftir 10 minuttum byrjaði VB at fara frá Kyndli, og eitt skiftið í fyrra hálvleiki førdi VB við 4 málum, og nú sá ikki so gott út hjá Kyndli. Sjálvt um grønklædda havnarliðið spældi fint, so høvdu tær tó stórar trupulleikar av at fylgja við vágskvinnum.

Síðstu løtuna av hálvleikinum megnaði Kyndil tó at svara aftur, og tá liðini fóru til hálvleiks var dysturin púra opin. Tá førdi VB 12-10.

### VB vann trygt

Gongdin í seinna hálvleiki var júst tann saman, sum í fyrra. Fyrstu løtuna fylgdi Kyndil væl við, men tá VB fekk gongd á spælið, so hevði Kyndil stórar trupulleikar. 10 minuttir inn í seinna hálvleik vóru enn bert 2 mál á muni, men so leyp VB avstað. Nú fekk VB verjuna at koyra ordiligt, og í næstan 10 minuttir loyvdu tær slett ikki Kyndli at skjóta mál. Í hinum endanum skoraði VB fleiri ferðir, og tá Kyndil endiliga skoraði aftur, tá var munurin longu blivin 7 mál, so nú var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Síðstu løtuna kom Kyndil eitt sindur betur við í dystin, men VB lat tær ongantíð koma heilt tætt aftur. Endaliga úrslitið gjørdist 25-19 til VB, og nú skal ganga illa hjá vágskvinnum, um tær ikki skulu røkka finaluni. Í dystinum í gjárkvøldið lótu tær í øllum førum ongan iva vera um, at tær ætla sær at taka lut í steypafinaluni fyrst í næsta mánaða.



*VB hevur meir enn annað beinið í steypafinaluni, tá tær vunnu tryggan sigur á útivølli ímóti Kyndli í fyrru hálvfinaluni.*

### FAKTA

**Kyndil-VB 19-25 (10-12)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Randi Wardum 6, Lina Andriulyte 5 (1), Anja Heinadóttir 3, Barbara Egilstrøð 2, Súsanna Petersen 1, Bjørg Syderbø 1, Ronja Mikkelsen 1
**VB:** Daiva Tuomaite 11 (2), Ivana Ljubicic 8 (3), Rannvá Johannesen 2, Svava Vestergaard 2, Laila Jespersen 1, Jóna Thorsteinsson 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, VB 5
**Útvísingar:** Kyndil 4, VB 1
**Dómarar:** Karstin & Kristian Joensen

SÍ-Mjølnir 1-3 (16-25, 23-25, 25-22, 19-25)

# Mjølnir basti SÍ

**Mjølnir vann ein tryggan sigur, tá teir vitjaðu hjá SÍ í meistaradeildini hjá monnum. Við sigrinum hevur Mjølnir fyribils lagt seg á odda í bestu mansdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mjølnir og ÍF hava ligið og kappast um oddasessin í bestu mansdeildini í alt ár. Fyri tað mesta hevur ÍF verið oman á, men í gjárkvøldið hevði Mjølnir møguleikan at taka oddasessin frá ÍF fyribils, um teir vunnu í Sørvági ímóti SÍ.

Undan dystinum lá Mjølnir á 2. plássi, beint í hølunum á oddaliðnum, ÍF, meðan SÍ lá á aftasta plássi. Tí mundu flest øll rokna Mjølnir sum stórfavorit at vinna dystin ímóti ungu sørvingunum.

### Mjølnir legði hart út

Mjølnir vísti eisini frá byrjan av, at teir ætlaðu at taka oddasessin frá ÍF, sjálvt um hann so bert hevði verið til láns. Klaksvíkingarnir byrjaðu sum eitt ódnarveður, og mest sum beinanvegin sást, hvønn veg hetta settið bar.

Mjølnir legði seg á odda mest sum alt fyri eitt, og teir øktu støðugt um leiðsluna. Tá settið kom at enda høvdu gestirnir vunnu ein tryggan 25-16 sigur.

Í øðrum setti var Mjølnir aftur oman á. Nú var SÍ tó við at rakna við, og teir góvu Mjølni harða mótstøðu. Munurin á liðunum í øðrum setti var mest sum eingin, men at enda dró Mjølnir longra stráðið og vann eisini hetta settið 25-23.

### SÍ vildi eisini spæla við

Í øðrum setti sást væl, at SÍ ætlaði sær nakað henda dagin. Teir vóru líka við at vinna hetta settið, men í triðja setti riggaði hjá heimaliðnum. Eisini hetta settið var sera javnt, men nú var tað í staðin SÍ, sum bleiv drúgvara liðið. Teir vunnu 3. sett 25-22, og nú var dysturin púra opin aftur.

Mjølnir vildi tó ikki loyva SÍ innaftur í dystin, og í 4. setti var eingin sum helst ivi. Her var Mjølnir aftur væl betra liðið, og at enda vunnu teir eisini ein tryggan 25-19 sigur í hesum settinum.

Sostatt vann Mjølnir dystin 3-1, og við sigrinum hava teir lagt seg á odda í meistaradeildini hjá monnum. Oddasessurin er tó elst bara til láns, tí vinur ÍF tann dystin, sum teir hava leikt færri enn Mjølnir, so eru teir aftur á odda í bestu mansdeildini.



*Við sigri á útivølli á SÍ hevur Mjølnir nú lagt seg á odda í meistaradeildini hjá monnum. Teir hava tó leikt ein dyst fleiri enn ÍF*